# Heppin í óhappinum



*Hann var óheppin, tá ið hann fór niðan av vegnum og rendi seg beint í ein stóran klett. Tíbetur kom maðurin eftir umstøðunum væl frá tilburðinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Eitt ferðsluóhapp innanfyri Skipanes um gott 9-tíðina leygarmorgunin kundi verið endað við eini vanlukku. Á myndini sæst, at bilurin hevur rent seg í ein stóran klett í veggrøvini**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Ein bilur við einum manni kemur koyrandi úteftir Skálafjørðinum. Tá ið hann nærkast Skipanesi, koyrir førarin niðan í øvuta síðu, fer niðan av vegnum og endar beint í einum stórum kletti, sum liggur við veggrøvina.

Bilurin stendur so nógv uppeftir enda, at vinstra afturhjólið hongur uppi.

Løgreglan í Runavík fekk fráboðan um hendingina klokkan 9.15 og fór beinanvegin á staðið saman við sjúkrabili og brandbili.

### Tosaði róliga

- Tá ið vit komu á staðið, var bilførarin við fullum viti. Hann tosaði róliga og greiddi frá, at hann føldi sær okkurt í bringuni – og at beinini tóktust føst. Tíbetur var ikki líkt til, at hann hevði fingið nakað sjónligt mein.

Løgreglan sigur, at neyðugt var at skera hurð og stólpa, soleiðis at maðurin kundi fáast úr bilinum.

- Roykur var eingin, so vit hildu ikki, at vandi var fyri eldi.

Tað tók brandmonnunum einar 15-20 minuttir at fáa mannin úr bilinum, sum síðan varð fluttur á Landssjúkrahúsið til kanningar.

### Av útróðri

Sum skilst, kom maðurin, sum annars hevði verið á útróðri, væl frá hendingini, men hann var eymur í kroppinum eftir stoytin, hann hevði fingið.

At bilurin er sterkur og úr góðum jarni, hevur ivaleyst havt sín týdning fyri bilføraran.

# Gera seg inn á "prestarnar"

PRESTAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki gamansleikur at vera "prestur" í Vágunum í hesum døgum.

Løgreglan í Havn veit at siga, at tilsamans 103 prestar, sum skulu vísa bilførarum vegin millum Hotel Vágar og Miðvág, vórðu traðkaðir niður av fólki, sum helst hava verið til gongu millum bygdirnar í vikuskiftinum.

Í samdøgur-frágreiðingini hjá løgregluni stendur, at eingin hevur grunað um herverkið - og ei heldur er nakar sæddur at fremja tað.

Hendingin í Vágunum er farin fram millum klokkan 02 og klokkan 8 náttina til leygardagin.

Tá ið tað var greitt, at prestarnir vóru traðkaðir, boðaði løgreglan Landsverki frá hesum.

# Kvinna sligin í høvdið

Í vikuskiftinum varð ein kvinna sligin av einum manni í miðbýnum í Havn.

Tað var ein triði persónur, sum boðaði løgregluni frá tilburðinum.

Løgreglan sigur, at kvinnan, sum varð flutt á skaðastovuna, meldaði mannin fyri at hava sligið.

Maðurin hevur verið til avhoyringar, men noktar seg sekan.

Løgreglan sigur, at maðurin, sum er meldaður fyri tilburðin, er síðst í 20-unum og kvinnan er nakað yngri.

-v.

# Svav úti á gøtuni

SVAV ÚTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnumorgunin fekk løgreglan í Klaksvík boð um, at ein ungur maður lá úti á gøtuni og svav. Líkt var til, at hann hevði einki vit, og andadrátturin var óreglugur. Maðurin var illa fyri.

Onkur, sum var komin fram við, hevði lagt ein jakka omanyvir mannin.

- Vit fóru á staðið at kanna málið, tóku mannin upp og sendu boð eftir lækna, sum vit altíð gera í slíkum føri.

Løgreglan í Klaksvík sigur, at teir onga løtu vóru í iva um, at maðurin mátti á sjúkrahús.

- Maðurin var eftir øllum at døma ávirkaður og fallin í óvit, sigur løgreglan.

# Gingu uppi á tekjuni hjá Frants Restorff




*Sunnunáttina noyddist løgreglan í Havn at reka ungfólk niður av tekjuni hjá Frants Restorff í miðbýnum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Býurin er eitt stórt sirkus í vikuskiftinum, sigur løgreglan í Havn**

ÓLEVNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnunáttina fekk løgreglan í Havn boð um, at nøkur ungfólk gingu uppi á tekjuni á bakarínum hjá Frants Restorff í Tórsgøtu.

Løgreglan fór á staðið og rak ungu fólkini, sum tá vóru tvey í tali, burtur.

Á løgreglustøðini í Havn siga tey, at einki herverk var framt á bygningin, og tí vórðu hesi ungu bara biðin um at halda seg burtur.

Klokkan 9 sunnumorgunin fekk løgreglan eisini fráboðan um, at nakrir fullir menn svumu uppi í Sandá á leiðini, har Eikin er.

Tá ið løgreglan kom á staðið, vóru menninir komnir upp úr aftur ánni í øllum góðum.

- Tað er ikki at taka munnin ov fullan at siga, at býurin er eitt stórt sirkus í vikuskiftinum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.